# TILTØK

**Gudstænastur**
**Trinitatissunnudagur**
*Vesturkirkjan.* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannis Fonsdal
*Argir:* kl. 11 Heri Joensen
*Hvítanes:* kl. 11, Sonja Klein
*Kvívík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Vestmanna:* kl. 11, Mogens T. Christensen
*Sandavágur:* kl. 11, Kjartan Mørkøre
*Miðvágur:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Norðskála:* kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
*Gjógv:* kl. 11 messa (kirkjan fyllir 75 ár – talvan gongur fyri kirkjuna), Hans J. Joensen biskupur
*kl. 18:* Bjarni Bæk, dómpróstur
*Christiankirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Haraldssund:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Tvøroyri:* kl. 11, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Stiftsstjórnina hjá Bíbliufelagnum
*Hvalba:* kl. 12.30, ólavur Rasmussen
*Hov:* kl. 12, altarg.,
*Suðuroyar Ellis- og Røktarheim:* kl. 12,
*Suðuroyar Sjúkrahús:* kl. 16, Patrick de Neergaard
*Sandur:* kl. 12, Jákup R. Hansen

***Broytt kirkjutíð á Viðareiði.***
Frá og við 6. juni verður farið í kirkju kl. 11

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 eisini Møti, har Óli Steinberg úr Klaksvík talar. www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Um viðrar, verður útifundur leygardagin kl. 11. Sunnudagin kl. 11 fer sunnudagsskúlin útferð. Tá verður bert møti kl. 18 við »ekko« frá Íslandstúrinum, drekkamunnur. Viðrar ikki, verður eisini møti kl. 11. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, ABC v/ Frank Jacobsen, evnið er: Fyrigeving við blóði Jesusar, 1. partur, kl. 18 Møti. Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin saman við Rhema, Evangeliihúsinum og Meinigheitini í Hoyvík. www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
**Sunnudagin 6. juni:**
Eldrasamkoman og varðmenn fara útferð vestur í Vágar. Vit møtast í KFUK kl. 9 sunnumorgunin til kaffi og rundstykkir.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
(inngongdin er flutt til nýggjaskúla)
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 verður evnið: Truplir spurningar úr Bíbliuni »Hvat við teimum, sum ongantíð hava hoyrt?«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 er evnið: »Halgan«. Á báðum møtunum talar Zacharias Zachariasen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn- og bíbiltími, samandráttur av Opinberingini. www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta kl. 11 v/ Paula Høj. Evnið: Trúfesti, sunnudagsskúli kl. 12. Útimøti á Vaglinum kl. 22. Mánakvøldið kl. 20 Felags Bønarmøti í Filadelfia. Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans. kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Mánaðarmøti: Trivnaður í samkomuni, Poul Færø talar.

**Samkoman Rhema**
Einki møti sunnudagin vegna legu. www.rhema.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Bergur D. Joensen, Meinigheitskórið syngur.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wladyslw Zdunek, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 sunnudagsskúli.

**4. grein skótar**
Vit hittast í KFUK mánadagin kl. 19.30.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kaldbak**
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 20 við skúlan.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Gunnar Reynslág av Argjum.

**Saron, Vestmanna**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18, Svein Askildsen talar. Nátturði verður aftan á møti. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Í sambandi við 100 ára haldið hjá Heimamissiónini verða vikuskiftismøtir í missiónshúsinum.
Leygarkvøldið kl. 20 við luttøku úr Porkeri har Hilmar Bech og Magnus Hansen tala og Streingjakórið syngur. Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara, Johanna, Halgerð og Marita syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jan Jacobsen, Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Berøa, Saltangará**
Sunnudagsskúli og breyðbróting kl. 11.30, síðani familjumøti kl. 12.45 og máltíð aftaná. Við vera fólk frá OM, ið fyrireika Doulos vitjanina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Johild Finsson talar. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Tabor á Toftum**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Hvat er ein vitnisburður v/ Alfred Olsen.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Húsakórinum, kl. 21 Ungdómsmøti, fáa vitjan av Doulos.




## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 5. juni, Gøta tlf. 44 10 86
Sunnudagin, 6. juni, Runavík tlf. 44 70 10

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

Vil du være
Dekoratør
eller
Blomsterdekoratør?
- så start din uddannelse i Svendborg
Yderligere information og tilmelding til Dekoratørskolen på Svendborg Erhvervsskole
Benny Ejdesgaard
telefon 212 001
SVENDBORG ERHVERVSSKOLE
Skovsbovej 43, 5700 Svendborg
www.svend-es.dk
ErhvervsUddannelserne

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Eg eri hin góði hirðin. Hin góði hirðin setir lív sítt til fyri seyðirnar.*
*Jóhs. 10,11*

Hirðamyndina kenna vit ymsastaðni frá í Bíbliuni. Hin góði hirðin hevur umsorgan fyri seyðum sínum. Jesus er hirðin og vit, hin kristna kirkjan, eru seyðirnir. Alt Jesu lív vitnar um, at hann hevur umsorgan fyri okkum. Hann gjørdist menniskja fyri at vit ikki skuldu sigla okkara egna sjógv uttan vón um frelsu og eitt meiningsfult lív í hesum heimi.

Langafríggjadagur og páskamorgun bera á sama bógv. Jesus vil, at vit ikki skulu liva og doyggja uttan vón. Og hesin Jesus, sum vit kalla hin góða hirðan, hevur opinberað fyri okkum Gud.

Gud er so sum Jesus er. Hesin Gud, sum er hin góði hirðin, er kærleikafullur, náðigur og miskunnsamur. Hann tekur sær av okkum, hini kristnu kirkjuni ella hann tekur sær av seyðunum.

Tú og eg kunna rokna okkum uppí seyðirnar, tað vil siga, vit eru elskað av Jesusi og hann hevur umsorgan fyri okkum. Hví hesum hesin Gud okkara, Jesus, kærleika til okkara? Jú, tí hann hevur skapað okkum. Vit eru skaparverk hansara og tí hevur hann krav uppá okkum. Jesus eigur okkum og hann vil ikki, at vit skulu fara til grundar.

At taka henda Jesus í álvara og at taka hann uppá orðið er at trúgva. At trúgva er at geva hesum skapara og frelsara okkara pláss í lívinum. Og tað er at tulka lív sítt út frá hesum kærleikans Gudi. Tað er at taka við hesum kærleika í trúgv og tað er at geva henda kærleika víðari til tann neyðstadda, forfjónaða, vrakaða og útstoytta. Hesin Jesu kærleiki kom til sjóndar á krossinum og uppreisnini og vit eiga hann við at geva hann víðari til onnur.

At vera kristin er at móttaka og geva, ella lívið er gáva og uppgáva. Og alt eiga vit frá Jesusi, hinum góða hirðanum. Hann gevur kærleika og ger okkum før fyri at geva kærleika til onnur.

**David Johannesen, prestur**



# TILTØK

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Leygardagin kl. 21 Ungdómsmøti við Øssur Kjølbro, Gospelkórið Gleði syngur. Aftaná midnáttarsamkomu opið hús, tónleikakafé við livandi tónleiki frá Credo. Sunnudagin kl. 15 Barnacafé, kl. 18 Møti við Jóannes Jóhannessen, Streingjakórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini á norðoyastevnu.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 16 Felags barnamøti verður fyri smáir einglar, sólstrálan og stríðsmenn. Sonni kemur og greiður frá arbeiðinum í Papa New Guinea, gáva kann latast til arbeiði. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sandur**
Sangløta verður í ungmannafelagshúsinum á Sandi leygarkvøldið 5. juni kl. 20 við luttøku av Streingjakórinum á Glyvrum og lokalum kreftum. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin kl. 17 Møti við luttøku av Streingjakórinum á Glyvrum og Bláa Krossi. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Eyðun Christiansen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin. Mánakvøld Bønarmøti kl. 21 og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 7. juni***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin, tlf. 316491.
**Tilhaldið á Sandi bjóðar okkum suður 28.-29. juni. Ymiskt verður á skránni, Bocciakapping. Kunningarstovan skipar fyri eini kvøldsetu í Dali. Tilmeld. 316491**
***Týsdagur 8. juni***
kl. 10-11.30 Felagssangur við starvsfólkunum á býráðnum. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-17 Opið hús
***Mikudagur 9. juni***
kl. 10-12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við.
kl. 14-16 Undirvísing í Boccia í kjallaranum
kl. 15 Túrur
***Hósdagur 10. juni***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
kl. 15 Tilhaldið Fløvin av Glyvrum vitjar
***Fríggjadagur 11. juni***
kl. 10-17 **Opið hús**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður í Skúvoynni sunnudagin 6. juni. Gingið verður í Fagradal við meira. Vit møtast á Gomlu Rætt kl. 9.30. Túrurin er miðal. Havi matpakka við. Ferðaleiðari er Óla Jákup Hentze úr Skúvoy. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan fríggjadagin 4. juni kl. 15. Fuglafjørður tlf. 444860 infoey-f@post.olivant.fo ella Runavík tlf. 449449 infoey-r@post.olivant.fo

**Farið verður til Hetlands mánadagin 21. juni og komið verður aftur mikudagin 23. juni.**
Kostnaður íroknað ferðing og gisting: Í 4-koyggju kamar umborð á Norrønu + 1 nátt á hotel í Lervick í dupultkamar kr. 1825 (einkult kamar á hotellinum 300 kr. eyka). Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan hósdagin 10. juni, Runavík tlf. 449449 infoey-r@post.olivant.fo og Fuglafjørður tlf. 444860 infoey-r@post.olivant.fo




HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 05.06. kl. 20[00]
Sunnudagin 06.06. kl. 19[30]



Leygardagin 05.06. kl. 23[00]
Sunnudagin 06.06. kl. 22[15]



Leygardagin 05.06. kl. 19[00]
Leygardagin 05.06. kl. 22[30]
Sunnudagin 06.06. kl. 19[00]
Sunnudagin 06.06. kl. 22[30]

KOMANDI FILMUR



**Frumsýning – Billettprísur: 70,- kr.**
Fríggjadagin 11.06. kl. 16[30]
Fríggjadagin 11.06. kl. 19[45]
Fríggjadagin 11.06. kl. 23[00]
Leygardagin 12.06. kl. 16[30]
Leygardagin 12.06. kl. 19[45]
Leygardagin 12.06. kl. 23[00]
Sunnudagin 13.06. kl. 16[00]
Sunnudagin 13.06. kl. 19[15]
Sunnudagin 13.06. kl. 22[30]
**Forsølan er byrjað**

P BIO KIOSKIN P
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**